

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 19
Februar 2014

ISSN 1603-0036

Tríggjar frímerkjaútgávur:
- Norðurlandaútgáva 2014
- Europa 2014: Ljóðføri
- Vitar

Posta
FAROE ISLANDS







FO 784-785 Royndarprent

# Norðurlandaútgáva 2014:
# Skip: Farma- og ferðafólkaflutningur

Tað sigur seg sjálvt, at eitt oyggjasamfelag úti í Norðuratlantshavi hevur eina ávísa siglingarsøgu at líta aftur á, hvat fólka- og farmaflutningi viðvíkur. Frá treystu knarrunum í landnámstíðini til nútímans bingjuskip og havgangandi bilferjur.

Gjøgnum øldir vóru tað seglskipini, ið hildu sambandið til meginlandið við líka. Tað sigur seg sjálvt, at hetta samband ikki var serliga álítandi – vindur og veðurlag, kríggj og farsóttir kundu føra til hungur og hall. Støðan varð ikki betur av, at vit stóran part av tíðini lógu undir handilsligum og kongaligum einarætti at sigla til Føroyar.

Ikki fyrr enn einarætturin varð avtikin og dampskipini avloystu seglskip, gjørdust flutningsmøguleikarnir tryggir. Upp gjøgnum farnu øld komu og fóru flutnings- og ferðafólkalinjur á føroysku rutuni – og nøvnini á mongum av skipunum vekja enn góð minni millum føroyingar. DFDS damparin Dronning Alexandrine, vanliga róptur "Drotningin" - tað meira nútímans ferðamannaskipið Kronprins Frederik, ferðamanna- og bilferjurnar Winston Churchill og England, eru øll skip vit minnast við takksemi.

Eina serstøðu hava tó tey fýra ferðamannaskipini hjá Skipafelagnum Føroyar, sum frá 1925 til 1969 sigldu á føroyarutuni undir navninum Tjaldur. Søgan um hesi ikonisku skip er ein partur fyri seg í føroyskari siglingarsøgu, men hon má bíða til eina aðra ferð.

**MS Norröna**

Í 1982 byrjaði ein nýggjur partur í føroyskari ferða- og farmaflutningssøgu, tá reiðaríið Smyril Line varð sett á stovn. Smyril Line keypti stóru svensku ferjuna Gustav Wasa, ið varð bygd í Rendsburg í 1973. Eftir umbygging í Flensborg, har skipið varð útgjørt til atlantiskar umstøður, varð ferjan, undir navninum MS Norröna, sett í sigling á leiðini Hanstholm, Bergen, Tórshavn og Seyðisfjørður. Umborð var pláss fyri 1050 ferðafólkum, 300 bilum og eitt sindur av stykkjagóðsi.




Tórshavn
Mynd: Ingi Sørensen

Fyrstu árini sigldi Norröna bara um summarið og varð leigað út til onnur endamál um veturin. Millum annað virkaði Norröna sum troppaskip á NATO venjingum í Eystrasalti, Norðsjónum og Írska havinum. Tríggjar vetrar í 80'unum og 90'unum varð Norröna eisini leigað út til danskar myndugleikar, ið nýttu hana sum hotelskip fyri flóttafólk.

Í 1998 fór Norröna at sigla alt árið – fyrstu tíðina tó bert millum Tórshavn og Hanstholm. Skipið var tó eftirhondini vorðið ótíðarhóskandi og kapasiteturin ov lítil til økta trýstið av ferðafólki, bil- og farmaflutningi.

Í 1999 skrivaði Smyril Line sáttmála við Flender Werft í Lübeck um bygging av einari enn størri ferju – hesa ferð serliga sniðgivin til sigling á Norðuratlantshavi. Nýggja Norröna varð latin reiðaranum tann 7. apríl 2003 og tríggjar dagar seinni, tann 10. apríl, varð hon sett í rutu á føroyaleiðini.

Nýggja Norröna er tríggjar ferðir størri enn gamla ferjan. Hon er 164 metrar long og 30 metrar breið, 36.000 BRT og kann sigla upp til 21 sjómíl um tíman. Hon rúmar 1.482 ferðafólk og 800 bilar. Umframt bilflutningin verður Norröna eisini brúkt til farmaflutning, serliga við trailarum.

Í 2012 flutti Smyril Line frá Hanstholm til Hirtshals, haðan Norröna síðan hevur siglt.

Umstøðurnar umborð á Norrönu eru stásiligar og í serflokki. Skipið varð í 2012 skýrt sum eitt av trimum teimum hestu ferðafólkaskipunum av Danish Travel Award. Her, sløk 50 ár eftir at "Drotningin", við koli og dampi, bardi seg gjøgnum okkara harðbalna sjógv, fer Norröna inn í sítt næsta ártíggjund sum avgjørda drotning av Norðuratlantshavi.

Anker Eli Petersen













# Frá smáarki til stuttfilm úr Føroyum

Norðurlandaarkið 2014, hevur sama serliga eginleika, sum frímerkjaarkið "Nordafar", sum varð givið út í september 2013.

Á arkinum er ein sonevnd AR-kota goymd. AR stendur fyri *Augmented Reality*. Um tú skannar frímerkið við tíni snildfon ella teldli ber til at síggja ein film um Føroyar.

Hetta er ein stuttfilmur, sum vísir løtumyndir úr Føroyum, landslag, virksemi, siðir, osfr. ímeðan vit hoyra Eivør syngja ein av sínum vøkru sangum.

Fyri at síggja filmin, er neyðugt at taka niður eina ókeypis app frá App Store ella Google Play. Les meira í kassanum høgrumegin.

Teldugjørda lagið verður lagt inn á tína snildfon ella teldil ígjøgnum eina app, sum er eitt lítið forrit. Við at nýta appina, kann myndin á frímerkinum gerast "livandi".

Ítøkiliga kanst tú taka appina niður á tína snildfon ella teldil, skanna frímerkið og síggja eitt hugtakandi filmsbrot um Føroyar.

"Sepac Stamps" appin, sum er ókeypis, kann takast niður frá:

- **App store**
- **Google Play**

Mannagongd: Tá tú hevur tikið appina niður, aktiverar tú hana og trýstir á "Load" knøttin á skerminum. Vend síðan myndatólinum á snildfonini ella teldlinum ímóti frímerkinum og fylg leiðbeiningini á skerminum. Filmsbrotið vísist síðan á skerminum við ljóði.

Bílegg frímerkjaarkið á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum ella www.stamps.fo. Fæst somuleiðis á posthúsum kring landið.







FO 786-787




Royndarprent

# Europa 2014: Ljóðføri

*"Hvis nu disse spillemænd, hvorom der i det følgende skal fortælles, havde passet deres jordiske dont og ikke været de underlige himmelstormere de var, vilde det maaske være gaaet dem langt bedre i denne smaaligste af alle kendte verdener. Men saaledes var det nu engang ikke. De var, hver paa sin vis, besatte, saadan som rigtige spillemænd er det fra naturens haand."*

Hvørja ferð eg hoyri eitt klassiskt lag fyri strúkarar, rennur hettar brotið úr De Fortabte Spillemænd hjá William Heinesen mær í huga. Tann lítli hópurin av fryntligum anarkistum, sum frá einum grummum og ruðuleikakendum veruleika, droyma seg burtur í stutt tónlistarlig brá av vakurleika og listarligari skipan. Teir eru glataðir, tí teir ikki passa inn í harðrenda veruleikan, har átrúnaðarlig fundamentalisma, girnd, fátækradømi og spírandi politisk áhugamál seta dagsskránna. Droymarar í tí Klondyke, sum við fyrra aldamót ráddi í Havn. Hóast ymiskir av lyndi og harða lagnu, finna teir saman í tónunum og breiða tónleik og vakurleika um smalar gøtur og stræti – sum songfuglar millum skríggjandi másar.

Søguliga sæð eru ljóðføri ikki ein partur av føroyskari siðvenju. Hóast tað til allar tíðir hava verið fólk sum hava átt og spælt okkurt ljóðføri, hevur tað gjøgnum øldir verið kvøðingin ið ráddi fyri borgum.

Tað eru tó onkrar søgur um fólk í Havn og úti á bygd, ið hava spælt upp á ljóðføri. Millum annað sigst mentanarligi úrmælingurin J. C. Svabo at hava verið ein framúr fiólleikari. Hann lærdi at spæla violin meðan hann las í Keypmannahavn og varð ofta biðin til spælimann til veitslur og brúdleyp hjá tí betra slagnum í Havn. Frá umleið 1890 vita vit um eina messingkvartett í Tórshavn, mannað av Anton Degn (kornett), Martin Restorff (althorn), Chr. M. Christiansen (tenorhorn) og J. P. Joensen (bass).

Tað var tó ikki fyrr enn nøkur ár seinni, tá navnframi bornholmarin Georg Hansen, vanliga nevndur "Bakar Hansen" (1844 – 1924), byrjaði at læra frá sær í horntónleiki, at ferð kom á tónlistarligu menningina. William Heinesen segði um Bakar Hansen, at hann dugdi at spæla á øll ljóðføri ið til vóru, og enntá nøkur ið enn ikki vóru uppfunnin.

Í 1903 stovnaði Bakar Hansen Torshavn Musikforening, sum eftirhondini varð til



Føroya Symfoniorkestur 2012
Mynd: Finnur Justinussen

Havnar Hornorkestur, ið enn er virkið. Í 1922 stovnaðu nakrir av hansara næmingum enn eitt hornorkestur ið róptist GHM (Georg Hansens Minde).

Um sama mundi, vóru tann líka so navnframi ferjumaðurin Poul Andreas Jacobsen, vanliga nevndur Dia við Stein, og hansara gávuríku synir eisini virknir tónlistamenn í Havnini.

Tað er hesar undangongumenn sum persónarnir í "De Fortabte Spillemænd" eru grundaðir á. Vanligir borgarar, hvørs hugur til tónleikin kom at merkja menningina av og áhugan fyri instrumentala tónleikinum í Føroyum.

**Musikkskúlin**
Upp gjøgnum tjúgundu øld gjørdust tilboðini um privata tónleikafrálæru fleiri runt um í Føroyum. Ættarlið av børnum og ungfólki vórðu upplærd av lærarum, sum sjálvbodnir og fyri lítla løn, kveiktu áhugan fyri tónleiki í landinum.

Fyrsta hálvalmenna royndin í tóneikafrálæru byrjaði í 1942, tá Tórshavnar Musikkskúli varð settur á stovn við tí endamáli, at læra gávurík ungfólk upp í tónleiki og tónlistarligum samstarvi. Hesin skúlin hevur síðan 1985 verið kommunalur. Átakið førdi til ymsar kamarkonsertir millum ár og dag og ein vaksandi áhuga fyri klassiskum tónleiki yvirhøvur.

Men í 1981 varð stig tikið til eina royndar-ætlan fyri almennum musikkskúla, og hetta førdi við sær at ein rættiligur musikkskúli varð grundaður í 1984. Tað eru í dag umleið 50 fulltíðarsettir lærarar á musikkskúlanum um alt landið.

Tað er ongin ivi um at musikkskúlarnir eru veruliga orsøkin til blómandi og fjølbroytta føroyska tónleikalívið. Eitt tónlistarligt ískoyti til føroyska nútíðarmentan, sum nú enntá hevur breitt seg út yvir landoddarnar. Hóast trong kor og sparingar plága mentanarlívið sum heild, verður arvurin eftir Bakar Hansen røktur til fulnar við ídni og idealistiskum arbeiði.

**Føroya Symfoniorkestur**
Krúnan á verkinum – at lyfta tónleikin



upp á altjóða hædd – er uttan iva Føroya Symfoniorkestur. Tað varð sett á stovn av musikkskúlalærarum í 1983, og hevði sína fyrstu konsert í Norðurlandahúsinum í Havn stutt eftir at tað varð latið upp. Dirigentar til hesa fyrstu konsertina vóru Bogi Lützen og Magne Synnevåg. Orkestrið hevur síðan verið stjórnað av fleiri føroyskum og útlendskum dirigentum – og síðan 2004 hevur Bernharður Wikinson verið fastur dirigentur.

Føroya Symfoniorkestur hevur gjøgnum árini notið gott av tí gávuríka hópinum av tónleikarum, sum musikkskúlarnir hava alt av sær. Tað er í dag mannað við fleiri yrkistónleikarum, ið dagliga virka heima sum í útlondum - næmingum í musikkskúlanum, lesandi á konservatoriunum og gávuríkum frítíðartónleikarum.

Føroya Symfoniorkestur heldur javnan konsertir við verkum av søguligum útlendskum og nútíðar føroyskum tónaskøldum. Serliga tær árligu nýggjárs-konsertirnar í Norðurlandahúsinum eru vælumtóktar og draga nógvar áhoyrarar. Orkestrið ger eisini nógv burtur úr at vekja tónleikaáhuga millum børn við vælfyrireikaðum barnakonsertum.

Føroya Symfoniorkestur hevur eisini verið á væleydnaðum konsertferðum í Hetlandi, Danmark og Íslandi.

Samanumtikið kann sigast, at hóast korini mangan eru trong fíggjarliga, trívist og mennist føroysk tónlist. Ósjálvsøkni dregur sjáldan góðs til garðs, men idealistiski andin megnar tó at halda ryggin rættan, eisini tá viljin at stuðla tí skapandi andanum ikki er til staðar.

Og onkustaðnis har úti í tí vakra og musikalska alheiminum, sita teir fimm glataðu spælimenninir, brøðurnir Moritz, Sirius og Kornelius, tónleikalærarin Boman og Mortensen magistari við tár á kinn og brosa bergtiknir til tónarnar frá teirra andaligu eftirkomarum.

Anker Eli Petersen










FO 788-790




Royndarprent

# Vitar í Føroyum

*Nú stórverk komið er í lag,*
*-ríkinum øllum til æru-*
*vitarnir gera her nátt til dag,*
*sum myrkur lá fyrr yvir báru;*
*ljós er nú leið yvir bylgju.*

Soleiðis ljóðar fyrsta ørindi í yrking í Føringatíðindi, í grein um teir vitar sum vóru tendraðir fyrstu ferð tann 1. oktobur 1893. Umframt stóra vitan í Nólsoy, vórðu fleiri smærri vitar settir upp runt um á oyggjunum. Tvey ljós vóru sett upp við munnan av Trongisvágsfirði, og tvey longur inni á fjørðinum, á Tvørábakka. Í Nólsoy varð eitt ljós sett upp við Kápilssund og eitt á Borðuni. Við munnan av Skálafjørðinum varð eitt ljós sett upp við garðsenda á Toftum. Í suðurendanum á Kunoy varð eisini eitt ljós sett upp, eitt sindur sunnanfyri bygdina Syðradalur.

Saman við stóra vitanum á Skansanum í Havn, ið varð reistur longu í 1888, bøttu hesir størri og minni vitar munandi um trygdina í innanoyggjasiglingini.

**Vitin á Toftum**

*Statsviti nr. 6670 – Altjóða nr. L4406*
*Knattstøða: 62° 05,10330 N - 6° 44,35934 W*

Sum longu nevnt, varð viti reistur við Skálafjørðin – við garðsenda á Toftum. Greinin í Føringatíðindi lýsir ljósið soleiðis:

*"Við garðsenda á Toftum, 1 fast ljós, sum visur hvítt frá Eystnesi vestur at Flesjunum og at Kirkjubølandinum sunnan fyri Glyvursnes, reytt haðani til mitt um Flesjanar, síðani grønt til norð um Flesjanar og haðani hvítt inn at Saltnesi."*

Vitin á Toftum er eitt rundleitt torn av stoypijarni. Sjálvt tornið er 7 metur høgt og lanternan stendur í 12,7 metra hædd. Vitin er hvítur við reyðum bandi undir lanternuni.



Vitin á Akrabergi
Mynd: Erik Christensen

Vitin er ein sokallaður vinkulviti, ið lýsir hvítt, reytt ella grønt, alt eftir hvar man er staddur í mun til ljósið. Lanternan blunkar 5. hvørt sekund. Hvíta ljósið sæst 12 sjómíl, meðan reyða og grøna ljósið sæst 9 sjómíl. Vitin er tendraður frá 15. juli til 1. juni.
Vitin er heilautomatiskur.

**Vitin á Akrabergi**
*Statsviti nr. 6500 - Altjóða nr. L4342*
*Knattstøða: 61° 23,64125 N - 6° 40,75310 V*

Í 1909 varð aftur víðkað um vitakapasitetin í Føroyum. Í hesum umfarinum varð tann ikoniski vitin á Akrabergi reistur. Havleiðin sunnanfyri Sumba er tiltikin vandasjógvur. Her liggja boðar og sker oman og undir sjónum og havstreymarnir, sum saman við vindi og veðri, gera leiðina vandamikla fyri bátar og skip. Støðan versnaði í 1884, tá "Munkurin" á sunnasta Sumbiarsteininum, ið annars var fyrsta landamerkið fyri flesjarnar, rapaði.

Vitin á Akrabergi er eitt rundleitt torn úr stoypijarni, og stendur á betongfundamenti. Sjálvt tornið er 14 metur høgt og lanternan stendur 74 metur yvir sjónum. Orsakað av ógvusliga vindinum, ið stundum herjar Akraberg, er vitin harafturat festur við sterkum stálveiri. Vitin er annars hvítur við reyðum hatti.

Vitin á Akrabergi er ein vinkulviti við hvítum, reyðum og grønum ljósi, alt eftir hvar man er staddur á sjónum sunnanfyri. Lanternan blunkar tvær reisur 2 sekund, 20. hvørt sekund. Hvíta ljósið sæst 20 sjómíl, meðan reyða og grøna ljósið sæst 14 sjómíl.

Vitin á Akrabergi er í dag heilautomatiskur.

Afturat sjálvum vitanum stendur eisini ein stórur tokulúður á Akrabergi.



Undir 2. heimsbardaga vórðu allir føroyskir vitar sløktir, og bert tendraðir um sameinda skipaferðslan ella krígsførsla kravdi tað. Bretska hersetingarvaldið hevði krígsárini eina radarstøð á Akrabergi, ið eygleiddi havleiðirnar sunnanfyri Føroyar.

Í 1957 varð eitt elverk sett upp á Akrabergi, ið veitti streym til bæði ljós- og radiovitan.

Tað finnast eisini eini vitapassarahús á Akrabergi. Her búðu teir skiftandi vitapassarnir við familju til 1988, tá núverandi vitapassarin flutti eftir ógvusligu jólaódnina. Húsini hava síðan verið brúkt av starvsfólkið, tá viðlíkahald varð framt, og í skrivandi stund eru húsini sett til sølu.

**Vitin í Dímun**
*Statsviti nr. 6580 - Altjóða nr. L4368*
*Knattstøða: 61° 40,96228 N - 6° 45,71721 V*

Í 1927 vórðu nakrir minni vitar reistir í Føroyum – og í tí sambandinum fekk Stóra Dímun eisini sín egna vita. Upprunavitin var eitt fýrhyrnt torn, 2,5 metrar høgt. Hesin vitin var gassrikin og røktaður av dímunarbóndanum. Eftir heimsbardagan var vitin í sera ringum standi og stóð at rapa í havið orsakað av omanlopi.

Núverandi vitin er eitt rundleitt torn, fimm metur høgt, meðan lanternan stendur 116 metrar yvir sjónum. Tornið er hvítt við reyðum bandi beint undir lanternuni. Vitin er ein strandarviti við hvítum ljósi, ið sæst 6 sjómíl og blunkar 5. hvørt sekund. Vitin er tendraður frá 15. juli til 1. juni.

Dímunarvitin er, sum allir aðrir vitar nú á døgum, heilautomatiskur.

Anker Eli Petersen




# Nýggj frímerkjaútgáva í 2014

## Heindrikur prinsur 80 ár

Ein nýggj frímerkjaútgáva er komin á útgávuætlanina í samband við at Heindrikur prinsur fyllir 80 ár.

Hetta er ein felagsútgáva saman við Post Danmark og POST Greenland.

Útgávan eitt vanligt frímerki umframt eitt hefti við 4 sjálvklistrandi frímerkjum. 10 frímerki eru í hvørjum heilarki av vanligum frímerkjum

Í samband við útgávuna verður somuleiðis ein felags mappa framleidd við frímerkjum úr Føroyum, Danmark og Grønlandi. Hóast myndir ikki eru tøkar av mappuni enn so ber til at bíleggja mappuna longu nú.

Útgávudagurin er 11. juni 2014.
Virði: 14,50
FO 791




Mynd 6. Donsku poststemplini við numrunum 238 og 284




Mynd 7a + b.
Tvey brævbjálvapetti. Eitt við poststemplinum KOLLEFJORD, og eitt annað við stjørnugraveraða poststemplinum FUGLEFJORD.




Mynd 8.
Frímerki, ið lýsa annan veraldarbardaga. Bretskir hermenn venja uttanfyri í Føroyum, og bretskir hermenn spæla við børn á eini gøtu.

# Tey fyrstu posthúsini

## eftir Henk Burgman AIJP, Amsterdam

Í 1854 fekk Føroyar eitt einfalt slag av heimaræði. Føroyingar, sum um tað mundið í høvuðsheitum arbeiddu við fiski og seyðahaldi, gjørdust tó ikki múgvandi av hesum, tvørturímóti. Føroysk jørð varð roknað sum niðursetuland hjá dønum, og so at siga allur handil (við fiski og seyði) var undir donskum valdi, og danir avgjørdu, hvat kundi gerast og ikki. Danir høvdu ikki einans ræði á handilsskipanini, men eisini á allari borgarligu skipanini í Føroyum. Postmálsøkið var eisini stýrt frá Danmark. Fyrsta føroyska posthúsið lat upp í 1870 í Tórshavn. Eftir hetta lótu posthús upp í Trongisvági (í 1877) og í Klaksvík (í 1888). Donsku poststemplini við numrunum 238 og 284 vórðu brúkt í Føroyum í hesum tíðarskeiðnum (mynd 6).

Eftir 1888 brúktu føroysku posthúsini poststempul við tilhoyrandi býarnavninum í groteskari skrift og dagfesting við árstali ella ongum. Eftir 1903 lótu fleiri smá posthús upp á øðrum oyggjum. Hesi posthús fingu stempul, ið høvdu tveir ringar við eini stjørnu umframt navnið á tilhoyrandi bygdini ella býnum. Stjørnan varð avtikin í 1929. Hesi stemplini vórðu nevnd stjørnupoststempul ella stjørnuklipt poststempul (mynd 7a og b).

Øll staðarnøvnini vórðu sjálvsagt skrivað á donskum. Tá hugsað verður um sosialu og mentanarligu menningina av vanliga føroyinginum, var hetta ikki óvæntað. So at siga øll hástættin í Føroyum var donsk. Tey, ið dugdu at skriva og tosa, vóru ofta so rótfest í danska liviháttinum, at samfelagið kundi sigast at vera býtt sundur í tvær stættir - við teimum fátæku og ofta ólisnu í lægru stættini og teimum ríku og mentaðu í hægru stættini (ið dugdu danskt og ofta onnur handilsmál afturat).

Men nógv av hesum broyttist eftir annan veraldarbardaga, tá ið Føroyar vórðu hertiknar




Mynd 9.
Føroyska Merkið.







Mynd 10a + b.
Tvey poststempul, ið vísa broytingina frá danska málinum (EJDE) til føroyska málið (EIÐI).




Mynd 11.
Frímerki útgivin fyri at hátíðarhalda 100 ára dagin hjá Fólkaháskúla Føroya.

av bretum frá 12. apríl 1940 til 16. mai 1945.

**Krígsárini**

Onki samband var millum Føroyar og meginlandið undir øðrum veraldarbardaga. Føroyar vóru sostatt ikki undir donskum stýri og høvdu onki danskt uppíbland hesa tíðina. Henda støðan gjørdi, at føroyingar veruliga fingu roynt seg á egnum fótum, og hetta riggaði stak væl og kendist ikki sørt sum sjálvræði. Skipaflotin byrjaði at nýta egið flagg, ið frammanundan hevði verið forboðið. Føroyskir pengaseðlar vórðu prentaðir við hjálp úr Bretlandi, og fyrsti føroyski flogvøllurin varð bygdur í Vágum.

Donsk frímerki vórðu brúkt øll krígsárini. Donsku frímerkini vórðu eisini yvirstemplað við nýggjum virðum fyri at samsvara við ávís vanlig postgjøld. Hesi virði fylgdu donsku postgjøldunum í krígsárunum.

Føroyingar sóu Ísland fáa sjálvstýri í 1944, og hetta blásti nýtt lív í ynskið um sjálvstýri í Føroyum, eins og víkingarnir av fyrstan tíð høvdu ætlað sær, tá ið teir settu búgv í Føroyum. Ein skal jú eisini hava í huga, at fleiri føroyingar kenna seg tættari knýttir at Íslandi og Noregi enn Danmark (mynd 8).

Ein sterk sjálvstýrisrørsla tók seg upp, men hesar kreftir megnaðu ikki at tryggja loysing frá Danmark í 1946. Tó fingu oyggjarnar í 1948 heimastýri. Føroyska málið, ið minti meira um íslendskt og fornnorrønt mál enn danskt, varð viðurkent, og Merkið varð viðurkent sum føroyskt flagg (mynd 9).

Men fleiri av fyrisitingarligu vansunum hildu fram. Í 1955 royndu føroysku sjálvstýriskreftirnar enn einaferð at tryggja meira sjálvræði, men eisini henda royndin miseydnaðist.




Mynd 12.
Eitt bræv sent við flogposti av Toftum tann 24. mars 1995 til Belgia. Frímerkið er av froðusprettuni, ið er vanlig í Føroyum.




Mynd 13.
Brævbjálvapetti við 20 oyra skipsfrímerki, sum kom út tann 25-10-1940 í Danmark, tá ið Danmark var undir týskari hertøku, og sum bleiv brúkt í Føroyum tann 20-01-1943, meðan Føroyar var hertikið av bretum.

Donsku poststemplini vórðu í 1962 skift út við stempul, ið høvdu føroysk staðarnøvn. Strænder bleiv til dømis til Strendur, og Kvalbo bleiv til Hvalba (mynd 10a og b).

**Tvey mál**
Danskt er enn annað av almennu málunum í Føroyum, hóast tað so at siga ikki verður brúkt í føroyska gerandisdegnum longur.

Donsk frímerki vórðu brúkt í Føroyum inntil tann 30. januar 1975, tá ið tey fyrstu føroysku frímerkini komu út. Í fyrstuni skipaði danska postverkið fyri bæði at áseta postgjøld og útgeva føroysku frímerkini, inntil føroyingar tann 1. apríl 1976 fingu egið postverk og kundu áseta egin postgjøld. Øll postmál komu nú á føroyskar hendur, og føroysk frímerki komu eftir hetta út í sambandi við tiltøk og hendingar í Føroyum (mynd 11).

Væl umtókt myndevni á føroyskum frímerkjum eru plantur og djóralív í Føroyum, umframt list, søga og mentanarligar sagnir og tjóðminni. Tað, at frímerkini hava so vakurt myndatilfar, er nóg góð orsøk til at savna føroysk frímerki. Men har er eisini nógv áhugavert at fara eftir hjá teimum savnarum, ið vilja granska gjøllari í føroysku postsøguni.

**Postsøga**
Fyri at nevna nøkur dømi um, hví føroysk postsøga er spennandi: til eru frímerki frá meira enn 80 ára langa tíðarskeiðnum, tá ið donsk frímerki vórðu brúkt, við poststemplum, fyrst á donskum og síðani á føroyskum. Tað er stórt fjølbroytni í stjørnupoststemplunum (mynd 13), ið finnast bæði við fjarskotnari stjørnu og ongari. Til ber at savna frímerkini, ið orsakað av frímerkjatroti vórðu yvirstemplað beint eftir fyrsta veraldarbardaga og fyrst í øðrum veraldarbardaga (mynd 14). Av tí at Føroyar eru so fjarskotnar, varð allur postur upprunaliga fluttur við skipi, og tað ber tí til at savna nógv áhugaverd føroysk skipsbrøv. Harafturat ber sjálvandi til at savna eina



Mynd 14.
Lokalt bræv, ið er yvirstemplað við 5 og 2 oyra virðum, ið tilsamans verður 7 oyru. Hetta yvirstemplið varð nýtt í tíðarskeiðnum frá 13. til 24. januar 1919.




Mynd 15.
Minnisark við trimum frímerkjum. Tað fyrsta er av róðrarbátinum Skopun, sum flutti post millum oyggjarnar í 19. øld. Tað næsta er av posthúsinum í Tórshavn, sum læt upp í 1906. Og tað triðja er av Símuni Paula Poulsen, ið var ein væl kendur føroyskur postmaður.

rúgvu av ymiskum postgjøldum.

Visti tú, at bretar, tá ið teir hertóku Føroyar undir øðrum veraldarbardaga, nýttu frímerki, sum vórðu prentað í Danmark, ið tá var hertikið av Týsklandi? Hesi frímerki vórðu innflutt til Føroyar og góðkend av týskarum gjøgnum UPU í Bern.

1. apríl 2001 gav føroyska postverkið eitt ark av frímerkjum út fyri at hátíðarhalda, at 25 ár vóru liðin, síðani fyrstu føroysku frímerkini komu út (mynd 15).

Nú eru Føroyar fíggjarliga væl fyri og hava nógv sjálvræði innan fyri karmar ríkisfelagskapsins. Búskapurin er enn nógv bundin at danska búskapinum, og tískil skal ein ikki vænta, at Føroyar fáa fult sjálvstýri í næstu framtíð. Sjálvt um nakrir føroyingar av álvara eru farnir at tosa um loysing aftur, so haldi eg ikki, at tað fer at henda, tí Føroyar fíggjarliga eru so bundnar at Danmark. Hóast Føroyar hoyra til Danmark, so eru Føroyar ikki limur í Evropasamveldinum, og flest allir føroyingar halda, at hetta er í lagi.

*Henda greinin varð upprunaliga útgivin á hollendskum í blaðnum 'Maandblad Filatelie'.*
*Høvuðsblaðstjóri: René Hillesum.*
*www.defilatelie.nl*

**Nøkur áhugaverd leinki um Føroyar:**

http://www.faroeislandssc.org/ Heimasíðan hjá 'Faroe Islands Study Circle' í Onglandi.

www.stamps.fo/ Heimasíðan hjá Posta Stamps.

http://www.framtak.com/ Her finst nógv kunning um Føroyar.

http://www.faroeislands.com/
Eisini nógv áhugaverd kunning.

http://www.noer.com/faroe/
Heimasíðan hjá Geoffrey Noer, savnari við áhuga í føroyskari postsøgu.

http://www.prostamps.de/
Yvirlit yvir frímerkini, ið vórðu nýtt í danska tíðarskeiðnum.

http://redhost.it/Filatelia/Faroe_Home/Home.html/ Heimasíðan hjá italskum savnara við áhuga í Føroyum.

Harafturat er sjálvandi ein rúgva av kunning um Føroyar á Wikipedia.

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 17. mars og 28. apríl 2014




Royndarprent

Nýggj útgáva: **Norðurlandaútgáva 2014**
Útgávudagur: 17.03.2014
Virði: 2 x 14,50 kr.
Nummur: FO 784-785
Smáark, stødd: 105 x 70 mm
Frímerkjastødd: 3,4 x 4,5 mm
Mynd: Finnur Justinussen
Uppsetan: Kári við Rættará
Prentháttur: Offsett
Prentsmiðja: LM Group, Kanada
Postgjaldsbólkur: Smábrøv til Evropa, 0-50 g







Royndarprent

Nýggj útgáva: **Europa 2014: Ljóðføri - Føroya Symfoniorkestur**
Útgávudagur: 28.04.2014
Virði: 14,50 og 19,50 kr.
Nummur: FO 786-787
Frímerkjastødd: 30 x 40 mm
Myndir: Fotostudio, Finnur Justinussen
Prentháttur: Offset
Prentsmiðja: LM Group, Kanada
Postgjaldsbólkur: Smábrøv til Evropa og miðalbrøv til onnur lond, 0-50 g







Royndarprent

* hesi frímerki eru eisini givin út í sjálvklistrandi hefti við seks frímerkjum




Nýggj útgáva: **Vitar í Føroyum**
Útgávudagur: 28.04.2014
Virði: 14,50, 15.50 og 17,00 kr.
Nummur: FO 788-790
Frímerkjastødd: 30 x 40 mm
Myndir: Erik Christensen, Ólavur Frederiksen og Finleif Mortensen
Prentháttur: Offset
Prentsmiðja: OeSD, Eysturríki
Postgjaldsbólkur: Smábrøv, miðalbrøv og stórbrøv til Evropa, 0-50 g

Framsíðumynd: Vitin á Toftum - Myndatøka: Finleif Mortensen
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo